# *Bygdaráðsfundur*

**Bygdaráðsfundurin 02.12.2013 *kl. 16.00 til kl 19.30***

| | | |
|---|---|---|
| *Fundarstað:* | *Fundarhøli* | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheiggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Jákup A. Olsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Hansy Skarðsá, skr. | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 166/2013 Fíggjarmál Alment**
J.nr. 2013-0011-0039
**Málslýsing**
Reguleringar á fíggjarætlanini fyri 2013

| | |
|---|---|
| **Rakstur** | |
| §1 Kommunal Fyrisiting | 0 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | -55.000 |
| §3 Børn & Ung | -30.000 |
| §4 Undirvísing | 0 |
| §5 Mentan & Frítíð | 335.000 |
| §6 Teknisk mál | 90.000 |
| §7 Kommunal virki | -155.000 |
| **Rakstur í alt** | **185.000** |
| | |
| **Íløgur** | |
| §3 Børn & Ung | 40.000 |
| §4 Undirvísing | 85.000 |
| §5 Mentan & Frítíð | -360.000 |
| **Íløgur í alt** | **-235.000** |
| | |
| **Rakstur og íløgur** | **-50.000** |
| | |
| **Inntøkur v.m.** | |
| §20 | 50.000 |
| | |
| **Úrslit av reguleringum** | **0** |

**Avgerð**
Reguleringar av fíggjarætlanini fyri 2013 vóru einmælt samtyktar.

**Mál nr. 167/2013 Fíggjarmál Alment**
J.nr. 2013-0004-0020
**Málslýsing**
Fyrisitingin hevur verið í samráðingum við 2 veitarar, Elektron og Nema. Støða er tikin til at taka av tilboðnum frá Nema, sum samanlagt hevði tað lægra tilboðið.

Íalt er talan um ein íløgu- og uppstartkostnað í 2013 uppá kr. 135.145. Árligi hýsingarkostnaðurin av EDV útbúnaði og leigukostnaðurin av EDV forritum verður uppá kr. 159.420, fyrstu ferð í 2014. EDV forritini verða tikin í brúk ígjøgnum fyrru hálvu av 2014, og tí verður leigukostnaðurin í 2014 nakað minni.

Teldlar til bygdaráðslimirnar er partur av íløguni av EDV útbúnaði. Bygdaráðslimir gjalda helvtina av útveganarkostnaðinum av teldlunum.

**Tilmælið**
Á fundi 25.11.2013 mælir Fíggjarnevndin til, at tikið verður undir við tilmælinum hjá fyrisitingini, og at íløgu- og uppstartkostnaðurin uppá kr. 135.145 verður útreiðsluførdur í 2013, meðan árliga leigan fyrstu ferð verður útreiðsluførd í 2014. Peningurin verður tikin av §1, kommunal fyrisiting, stovninum kommunuskrivstovan, konta 152000: Teldubúnaður og EDV menning.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var var einmælt samtykt. Jákup Olsen var úti tá málið var viðgjørt.

**Mál nr. 168/2013 Fyrisitingarmál Alment**
J.nr. 2013-0004-0021
**Málslýsing**
Kommunan skal áseta og lýsa teir almennu bygdaráðsfundirnar fyri komandi ár. Undanfarna ár vóru bygdaráðsfundirnir mánadagar kl. 18.00. Uppskot til bygdaráðsfundirnar í 2014, sum skulu verða 10 í tali, eru.

**Fundir í 2014:**
Mánadagin 27. Januar
24. Februar
31. Mars
28. Apríl
26. Mai
23. Juni
1. Septembur
6. Oktobur

3. Novembur
1. Desembur

**Nevndarfundirnir í 2014 eru í viku:**
3-7-12-16-20-24-34-39-43-47

**Tilmælið**
Á fundi 25.11.2013 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við, at bygdaráðsfundirnir og nevndarfundirnir, fyri 2014, verða sum ásett omanfyri.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 169/2013 Fíggjarmál Alment**
J.nr. 2013- 0013-0003
**Málslýsing**
Í skrivi 05.11.2013 frá Føroya Kommunufelag, viðv. eykaumboðsráðsfundi, er komið uppskot til lógarbroytingar samb. §14 í felagslógunum:

a) Avtøka av Føroya Kommunufelag.
Skotið verður upp, at taka Føroya Kommunufelag av 31. desembur 2013, við tí endamáli, at kommunurnar fara saman í eitt nýtt felag, Kommunufelag Føroya, 1. januar 2014.

b) Ognir og skyldur.
Skotið verður upp, at limir Føroya Kommunufelags fara inn í Kommunufelag Føroya við líka stórum innskoti, pr. borgara, sum limirnir í hinum felagnum. Henda samtykt krevur at verða viðgjørd og samtykt av hvørjum kommunustýri sær.

Sambært roknskapi Føroya Kommunufelags pr. 31.12.2012, eigur felagið felagshúsið í Kvívík og innbúgv áljóðandi 2.151.364 kr. í útveganarvirði og 1.862.805 kr. í kontantum.
Debetorarskylda 393.188 kr., og stuttfreistað skuld er 109.009 kr.

**Tilmælið**
Á fundi 25.11.2013 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við at avtaka Føroya Kommunufelag, og at farið verður inn í nýggja felagið við sama lutfalli, sum Kommunusamskipan Føroya.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr.170/ 2013 Vegamál   Alment</u>**
<u>J.nr. 2009-0044-0026</u>
**Málslýsing**
Borgarar við Gaddavegin hava ynski frammi um ferðsluforðingar.

**Tilmælir**
Á fundi 19.11.2013 mælir Tekniska nevnd til, at tríggjar ella fýra bungur verða gjørdar á Gaddavegnum, og koma við eini kostnarmeting og plasering til nevndarfundin í januar 2014.

Mælt verður tó til, at 4-5 blomsturkassar fyrst verða uppsettir á Gaddaveganum, meðan arbeitt verður víðari við ferðslutrygdini á Gaddavegnum. Og verður hetta gjørt í smaráð við galdandi ferðslumynduleikar.

Á fundi 25.11.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og mælir til, at peningurin til blomsturkassarnar verður tikin av konto stovninum, viðlíkahald bygdavegir.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru vóru einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 171/2013 Byggimál     Alment</u>**
<u>J.nr. 2013-0042-0325</u>
**Málslýsing**
Ì skrivi 05.11.2013 sendir Búnaðarastovan umsókn, frá SEV, til ummælis.

Ì umsóknini søkir SEV um at fáa loyvi at seta upp vindmátimastur í Nes Haga, sambært hjáløgdu tekning, har staðfestingin til vindmátimastrina sæðst miðskeiðis í myndini.

Talan er um eina mastur á umleið 45m, ið verður sett niður á lítið betongfundament og annars fest við bardonum. Økið til fundamentið er umleið ein fermetur.

Ætlanin er harumframt at grava ein signal-kaðal frá mátimastrini til transformarahúsið, sum stendur við vindmyllu 4, ið er tann ytra av teimum báðum innaru vindmyllunum í Nes Haga. Longdin er umleið 500m.

**Tilmælið**
Á fundi 19.11.2013 mælir Tekniska nevnd til at viðmæla, at Sev fær loyvi til at seta upp vindmátara og til at grava.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 172/2013 Ymiskt     Alment**
J.nr. 2013-0049-0018
**Málslýsing**
Elektro v/Jóhan Gaard, sum hevur havt el-arbeiðið á havnalagnum og bygningunum hjá Nes kommunu, sigur arbeiðið frá sær av heilsuávum.

Í løtuni røkir Rók– El arbeiðið viðvíkjandi gøtuljósunum í kommununi. Skal Rók-El yvirtaka arbeiðið hjá Elektro?

**Tilmælir**
Á fundi 19.11.2013 mælir Tekniska nevnd til, at Rók-El yvirtekur arbeiðið hjá Elektro.

Á fundi 25.11.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 173/2013Havnamál     Alment**
J.nr. 2007-0046-0007
**Málslýsing**
Byggivirkið KBH sp/f hevur tveir leigu sáttmálar á havnalagnum, sum eru galdandi í hvørt sítt áramál. Í leigusáttmálanum, har bygningurin stendur á, er leigumálið galdandi í 25 ár.

Í leigusáttmálanum yvir økið, har KBH sp/f hevur sínar bilar standandandi, er leigumálið galdandi í 1 ár.

KBH sp/f ynskir at fáa leigumálið, við Nes kommunu, í ein leigusáttmála, og at áramálið verður eins, sum tað longra áramálið.

**Tilmælið**
Á fundi 19.11.2013 mælir Tekniska nevnd til, at ein leigusáttmáli verður gjørdur yvir leigumálið hjá KBH sp/f, og at áramálið verður 25 ár.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Bygdaráðsfundur*

**Mál nr.174/2013 Byggimál Alment**
J. nr. 2013-0046-0066
**Málslýsing**
Hin 13.11.2013 søkir P/F Sandgrevstur um byggiloyvi til eina goymsluhøll á havnalagnum. Bygningurin verður umleið 1000m² stórur, 40 m langur, 25 m breiður og 5 m høgur. Takið hevur ætlandi ein stigning á umleið 15 gradir.

Grundin verður stoypt uml. 2,7 m upp og restin verður klætt við stáli ella timbri. Gólvið verður stoypt. Bygningurin verður ikki bjálvaður, tí hann verður bert brúktur til turrgoymslu.

**Tilmælir**
Á fundi 19.11.2013 mælir Tekniska nevnd til, at P/F Sandgrevstur fær eitt prinsipielt byggiloyvi til goymsluhøll. At tekniska umsitingin fer í samráð við Sandgrevstur um plasering, og onnur viðurskiftir í samb. við byggingina.

Á fundi 21.11.2013 tekur Vinnunevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Vinnunevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 175/2013 Byggimál Alment**
J. nr. 2013-0046-0067
**Málslýsing**
Hin 14.11.2013 søkir Saltsølan um loyvi til at seta upp saltsilo og transportband uttanfyri bygningin á havnalagnum við Rætt.

Ætlanin er, at saltsilo og transportbond verða fastgjørd og verða ikki til ampa fyri ferðslu runt bygningin.

Millum bygningin og fyrstu stúttuna verða umleið 7 m. Fríhæddin verður í minsta lagi 4,65 m, sum er mest loyvda hædd fyri eitt akfar eftir ferðslulógini.

**Tilmælir**
Á fundi 19.11.2013 mælir Tekniska nevnd til, at Saltsølan fær loyvi til at seta transportband, og stúttir upp á økinum, men at ætlaða transportbandið, sum skal standa suður og norð, og siloin, ikki verða sett føst, men kunnu flytast burtur frá, tá hesi amboð ikki verða brúkt.

Á fundi 21.11.2013 tekur Vinnunevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Vinnunevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 176/2013 Vegamál Alment**
J.nr.2008-0048-0044
**Málslýsing**
SEV er biðin um at geva Umhvørvisstovuni eina frágreiðing um, hví bummur ikki er komin á vegin út til vindmyllurnar í Neshaga. Í sambandi við svarið, kundu vit hugsað okkum at hoyrt tykkara hugsan um hetta mál.

Í stuttum kann sigast, at ein av treytunum frá Umhvørvisstovuni, í sambandi við loyvið var, at bummur verður settur upp. Hetta fyri at stongja vegin fyri almennari ferðslu og soleiðis verja fugla- og djóralívið í økinum fyri óneyðuga ávirkan.

**Tilmælið**
Á fundi 19.11.2013 mælir Tekniska nevnd frá, at bummur verður settur upp.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 177/2013 Mentamál Alment**
J.nr. 2013-0031-0143
**Málslýsing**
08.08.2013 er skriv komið frá Almannaverkinum um val av umboðum í upptøkunevnd, fyri eldrasambýli og ellis- og røktarheim í øki 3.

Vísandi til kunngerð nr. 99 frá 05. juli 2013 um røktarheim og eldrasambýli, sum kemur í gildi tann 01. 09.2013, skulu 6 upptøkunevndir veljast fyri upptøku á eldrasambýlum og ellis- og røktarheim í øllum landinum.

Vísandi til § 8 og 9 í kunngerðini vil Almannaverkið við hesum gera vart við, at kommunurnar í einum upptøkuøki skulu velja fýra umboð fyri røktarfakligari- ella aðrari hóskandi útbúgving í upptøkunevndini fyri økið, ið skal virka sum felags upptøkunevndin fyri bæði eldasambýlir og ellis- og røktarheim í økinum.

Um kommunurnar í einum upptøkuøki ikki kunnu semjast um at velja umboð í upptøkunevndina, verður atkvøðugreiðsla , sambært § 10 í kunngerðini.

Nes kommuna er saman við Fuglafjarðar-, Sjóvar-, Runavíkar- og Eystur kommunu partur av øki 3. Til upptøku á ellis- og røktarheim er Eiðis kommuna eisini partur av øki 3.

Almannaverkið fer við hesum at heita á Nes kommunu, saman við hinum kommununum í upptøkuøki 3, at taka stig til at velja fýra umboð, sum tilskilað í omanfyri nevndu kunngerð, og at boða Almannaverkinum frá hvørji umboð eru vald.

**Málslýsing**
Borgarstjórarnir í Eysturoynni hava havt fundir í samb. við kunngerð nr. 99 um upptøkunevnd, og hava mótmælt hesum yvirfyri landsmynduleikunum uttan, at nakað er komið burtur úr tí.

Á fundi millum borgarstjórarnar 19.11.2013 var semja um, at taka undir við kunngerðini, um upptøkunevnd, og royna at fáa sum mest møguligt burtur úr tí.

**Tilmælir**
Á fundi 20.11.2013 mælir Mentanarnevndin til at taka undir við kunngerð nr. 99, um upptøkunevndir til eldrasambýlir og ellis- og røktarheim, og at innstilla, leiðaran á Vesturskin, sum lim í upptøkunevndina.

Á fundi 25.11.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentarnarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr.178/2013 Mentamál Alment**
J.nr. 2013-0021-0070
**Málslýsing**
Vaskifólk, sum er í farloyvi, frá vaskiarbeiðinum í Tofta skúla, søkir í skrivi 10.11.2013 um at fáa longt sítt farloyvi, frá 01. januar 2014 til skúlabyrjan 2014-2015.

**Tilmælið**
Á fundi 20.11.2013 mælir Mentarnarnevndin til, at vaskifólkið fær longt sítt farloyvi, fram til skúlabyrjan 2014, og at farloyvið verður ikki longt eftir skúlabyrjan 2014-2015.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr.179/2013 Mentamál Alment**
J.nr. 2013-0019-0052
**Málslýsing**
Í skrivi 17.11.2013 verður søkt um stuðul til fløgu við Hermanni og øðrum frá V4.

Fløgan kemur út 22.11.2013 og kostar kr. 100,00 pr. stk.

# *Bygdaráðsfundur*

**Tilmælir**
Á fundi 20.11.2013 mælir Mentanarnevndin frá at stuðla við at keypa fløgur.

Á fundi 25.11.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentarnarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.